Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

Akfør

AUDI 80
hvítur, árg. 87, vælhildin og í sera góðum standi, koyrt 132.400 til sølu fyri 50.000,-
Tlf. 211952

BMW 210 I
Til sølu fyri 45.000 kr.
Tlf. 220149

DAIHATSU CHARADE
til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 319964

DAIHATSU CHARMANT
Árg. ´87, skaða framman, motorurin er góður. Dekk á 8 felgum. Kostnaður 4.000 kr.
Tlf. 316105

DIESEL BILUR
Ford Fiesta 1,8 diesel, árg. ´94. Powerstýring, sóltak og alu-felgir. Í sera góðum standi, til sølu fyri 72.000 kr.
Tlf. 214413 ella 217192

EIN
Suzuki DM 50 Samurai til sølu fyri 6500 kr.
Tlf. 455771

EIN
Audi 80, 2.3 E, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 282570 ella 332570

EIN REYÐUR
Nissan Sunny, bíliga til sølu. Bilurin hevur píkadekk undir og summardekk á felgu fylgja við.
Tlf. 315760

FELGUR
4 góðar stálfelgur 14", v/ brúktum kavadekkum, passandi til m.a. Toyota Hiace, bíliga til sølu.
Tlf. 447120

FÝRA NÝGGJAR
orginalar BMW 16" alu felgur v/ nýggjum dekkum. Lágprofil týsk super dekk (spesiel til BMW), sera flottar, ring nú og keyp einar flottar felgur til BMW'in.
Tlf. 211372
millum kl. 8-9 á morgni

MITSUBISHI
Galant 2.0 GTI, 16v, við nógvari eykaútgerð, so sum 4wd, og el-rútar, árg. 9/96.
Tlf. 213335

HONDA CIVIC 1.6
VTI, er til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin er sera væl hildin, hevur el-spegl, -rútar, powerstýring og aircondition. 16" felgur og senkaður, hevur 160 HK.
Tlf. 447220

ISUZU
Pick-up, árg. 88, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 215140

FORD ESCORT 1,6 CL
árg. ´86 til sølu sum eykalutir.
Tlf. 317577

MAZDA 323
frá januar 1999, selist fyri 98.000,- kr. Er botnviðgjørdur, eins og nýggjur sleipikrókur fylgir við.
Tlf. 332203

MAZDA 626
2.0, árg. ´87, til sølu fyri 10.000 kr. Bilurin er sýnaður 07.01.2000.
Tlf. 422522 ella 422411

MITSUBISHI
L300, árg. 1987, til sølu.
Tlf. 456878 ella 216878

MITSUBISHI
árg. 87, nýsýnaður, til sølu. Áhugaði ringið
tlf. 318811 eftir kl. 17

MITSUBISHI GALANT
1.8 TD til sølu sum eykalutir fyri 2500 kr.
Tlf. 422183
fartlf. 212181

MITSUBISHI PAJERO 2.5 TD, árg. 88, el-rútar, powerstýring, hita í setrum, ca. 210.000 km, til sølu um nóg gott boð fæst.
Tlf. 281344

NISSAN
King Cab 4x4, árg. 91, til sølu.
Tlf. 210499

NISSAN BLUEBIRD
T12, 2.0 SLX, hvítur, árg. 89, hevur el. rútar, el. sóltak og centrallás, bíliga til sølu.
Tlf. 212359

OPEL ASCONA
árg. 88, hevur koyrt 165.000 km til sølu.
Tlf. 318086

OPEL ASCONA
árg. 82, til sølu sum eykalutir. Fýra píkadekk á felgum + 4 heilársdekk 155 x 13, lítið brúkt, umframt aðrir eykalutir fyri 3.000 kr.
Tlf. 372634

OPEL ASTRA
Ein 3 ára gamal Opel Astra 1700 Turbo diesel til sølu vegna keyp av størri bili.
Tlf. 316926
best eftir kl. 18.30

OPEL ASTRA
1.6i Club, 5 hurðar, koyrt 24.000 km, árg. 98, hevur centrallás, el-spegl, til sølu fyri 115.000 kr. Við fylgja fýra lítið brúkt summardekk, er at hitta á
tlf. 319676
ella 281434, Peter

OPEL CORSA 1.4
myrkabláur, árg. 4/98, bert koyrt 23.000 km, er sum nýggjur, til sølu vegna keyp av størri bili.
Tlf. 456963

OPEL KADET 2.0
GSI, 16v. Bilurin hevur 190 HK, ABS, powerstýring, sentrallás, el-rútar, sóltak, alarm, leðurkabinu, com. nýsproytaður, senkaður og sportfelgur, árg. 4/89, til sølu.
Tlf. 314110

OPEL OMEGA 1.8i
árg. 90, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 424469

SPORTFELGUR
15" fondmetal, 5 hol, passa t.d. til Toyota Camry og Carina. Felgurnar eru sum nýggjar, til sølu fyri 3.000 kr, nýprísur 4.000 kr.
Tl.f 217966 ella 447966

TOYOTA
landcruiser, toppstykki, pumpa, o.a. til sølu.
Tlf. 449045
ella 283753 eftir kl. 17

TOYOTA CAMRY
árg. 87, 2.0 við powerstýring, til sølu.
Tlf. 441687

TOYOTA CAMRY
árg. 87, sýnaður 1999, í sera góðum standi.
Tlf. 452089

TOYOTA CARINA E
1600 XLI, til sølu.
Tlf. 311012 ella 212822
aftaná kl. 17

TOYOTA CELICA 2.0
GT, Twin Cam, árg. 87, til sølu, við fylgja 16" sportfelgur + píkadekk á 15" felgum. Bilurin er hvítur og sær sera gott út! Prísur: 60.000,- Áhugaði kunnu ringja tlf. 314212

TOYOTA COROLLA
AE42, árg. 89, km 135.000, við skaða, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 361134 eftir kl. 19

TOYOTA COROLLA
XLi sedan, árg 09/91, sýnaður 24. feb. 2000. Hvítur við sóltak, í góðum standi. Nýggj lamelldekk. Anlegg við bandspælara, til sølu um nóg gott boð fæst. Tlf. 313040
ella 319501, Ragnar

TOYOTA COROLLA
1.6 XL, árg. 89, til sølu.
Tlf. 373412

TURBO
o.a. til ein Toyota 2 L motor, til sølu.
Tlf. 317413 ella 221017

VETRARDEKK TIL SØLU
Nýggj lamep/píkadekk, flest allar støddir, til sølu.
Tlf. 282691 ella 317691

VOLVO 440
GLI, við powerstýring og varma í setrinum, árg. 89, í sera góðum standi.
Tlf. 441687

VOLVO 440 SLT
1.7i, hevur koyrt 133.000 km, til sølu. Bilurin hevur alla eykaútgerð s.s. el-rútar og -spegl, infocantral, vel og spoylarar.
Tlf. 447942

VW PASSAT
Ein gráur VW Passat, 1.8 st., árg. 89, til sølu. Koyrir gott og er í góðum standi. Hevur powerstýring.
Tlf. 315618 ella 213580

YNSKIST TIL KEYPS
Baksetur til Mitsubishi Pajero. Vinarliga ring á
tlf. 217322

Amboð

ARBEIÐSSKÚRAR
til keyps og leigu.
Kaj Andreasen & Co.
Tlf. 315600 fax 318008

YNSKIST
Brúkt blandimaskina ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 318162

Arbeiði

24 ÁRA GAMAL
átekur sær alt fyrifallandi arbeiði, í styttri ella longri tíðarskeið.
Tlf. 315861

ALT
fyrifallandi arbeiði verður gjørt av tilkomnum manni, ið er handverkari.
Tlf. 310352

ARBEIÐI SØKIST
36 ára gamal maður søkir arbeiði. Alt hevur áhuga.
Tlf. 220295

ARBEIÐI/LÆRUPLÁSS
29 ára gamal maskinsmiðjur við FHS prógvi sóknast eftir arbeiði ella læruplássi í Havn. Alt hevur áhuga. Hava tit nakað at bjóða mær, so vinarliga ringið tlf. 316550

VIT GERA
hitaverk - sanitet - vatnleiðingar - frágrenningar - takrennur og T-rør.
Tlf. 221241

Barnaútgerð

BABYLIFT
Væl viðfarin ljósablá babylift við motivum á, til sølu fyri 300 kr. Nýprísur 800 kr. Bert brúkt til eitt barn.
Ring 319460, Ann-Mari

BARNAVOGNUR
við lift, av slagnum Brio. Grønur, 15 mðr. gamal, sær út sum nýggjur, regnslag og flugunet fylgja við, til sølu fyri 2.800 kr.
Tlf. 448148

BRIO COMBIVOGNUR
Myrkabláur leðurlook combivognur við leðurlook koyriposa, til sølu.
Tlf. 421680

LJÓSAGRÁUR
barnavognur til sølu.
Tlf. 457770

SERA GÓÐUR
og vælhildin tvíburðastólur av merkinum »Brio«. Hevur kalesju, koyriposa, selar og kurv.
Tlf. 319119 ella 214119

TIL SØLU
Ein nýggj tremmusong við madras 1000 kr. Ein baby koyristólur 250 kr. Ein babylift 350 kr.
Tlf. 313860

TIL SØLU
2 tremmusengur við madrassu til sølu.
Tlf. 457957

Barnaansing

VIL DU ARBEJDE
på en bondegård i Island? En dygtig pige ønskes til at passe børn på en bondegård i Island. Børnene er to og fire år gamle. På gården holder vi ko, får, heste, hunde og en kat. Løn ca: 30.000 ikr pr. måned og radningstid ca. seks måneder.
Tlf. +354 4351461
Hulda Hrönn
adr. Geirshlíð, 320
Reykolt, Island
e-mail:
huldahronn@simnet.is

Bátaútgerð

YANMAR BÁTA-MOTORAR
-frá 9 HK til 420 HK.
Vit selja og umvæla Yanmar bátamotorar.
Tosið við okkum og fá eitt gott tilboð
THOMAS DAM amboð & maskinur
Tel. 31 04 44 • Fax 31 78 38

8-MANNAFAR
í góðum standi til sølu.
Tlf. 314511 ella 283411

SNELLUR
vit hava nakrar bíligar brúktkar snellur á goymslu. Snellurnar verða seldar við garanti. Áhuga ringi
tlf. 212422

STIGFJORD 28"
til sølu. Sera væl útgjørdur. Klárur til fiskiskap.
Tlf. 444632

Bingo

BINGO
Kiwanisklubburin Rósan hevur bingo í Pállstovu leygardagin kl. 15. Full pláta kr. 500,- + síðuvinning. Drigið verður millum spølini, 15 plátur kr. 100,- 15 vinningar á lutaseðli m.a. 1 vikuskiftis flogferð til Danmarkar og 1 vikuskiftis flogferð til Íslands. Eisini verður eyka spæl. Koyring heim.
Kiwanisklubburin Rósan

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:
❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Bræva skifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Leikur ❑ Lutaseðlar
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: .....
Tlf.: .....

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

BÁRUTOMBOLA
Stórt páskareggs-tombola verður leygardagin 18. mars frá kl. 9.30-13.00 og frá kl. 18.30-22.30 á Statoilstøðini. Ein ørgrynna av páskareggum, ja uml. 5-600 páskaregg.
Bygdarfelagið Báran

EYDNUHJÓL
verður í EB-húsinum sunnudagin 12/3 kl. 16.
EB

GOTT BINGO
verður í Bygdarhúsinum í Hósvík sunnudagin 12.marts. kl. 16. Nógvir góðir vinningar. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspælið nú gávukort á 1.900 kr. 10 lutir á lutaseðlinum. Øll eru vælkomin.
Bygdarfelagið Varðin

GOTT BINGO
verður í Tvøroyra klubba leygardagin 11. mars kl. 20. 1. eykaspæl endar.

SUÐRINGAR!
Gott bingo verður í Samkomuhúsinum sunnudagin 12. kl. 16.00.
Sumbiar Ítróttarfelag

Burturm. / funnið

EASTPAK TASKA FUNNIN
Er tað nakar ið hevur mist eina Eastpak tasku, við einum jakka í. Funnin í einum bussskýli við Gundadal. Um tað er tín so ring á
tlf. 310463

HJÁLP
Er tað nakar, sum hevur tikið eina bláa Fjällräven skúlatasku í SMS, so vinarliga ringið tlf. 220915 so skjótt sum til ber

HYGG HER!
Konvoluttur við pengum burturmistur leygarnáttina í miðbýnum, navn á konvoluttinum. Er tað nakar, sum hevur funnið hann? Finningarlon verður latin.
Ólavur E. 361041

LÍTIL SVARTUR
leðurpungur við einum Ruko-lykli og persónligum pappírum, mistur í Hoydølum 3.3.2000. Finningarlon verður latin.
Tlf. 312378

TANN
sum hevur funnið ein reyðan og svartan ryggsekk við millum annað eini stórari brúnari húgvu og camera í. Vinarliga ring 422027

Býli

BÝTA UM HÚS Í SUMMAR?
Føroysk/donsk familja, búgvandi í Egtved, ynskir at býta um hús í umleið 3 mðr. frá umleið 1. mai – helst í Klaksvík. Okkara hús eru 154 kvm. Umleið 18 km til Billund og Vejle. Áhugaði kunnu ringja til Maritu Dalsenni Rask Tlf. 075551329
e-postur: brask@email.dk
ella tlf. 456430

ELDRI HÚS
í Ljósá til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 423459

HÚS TIL LEIGU
Eldri hús í Leirvík til leigu.
Tlf. 283902

HALDI SUMMARFRÍ Í DANMARK
Býti hús/íbúð við okkum í Tórshavn. Vit eru eini tilkomin hjún, vit hvørki roykja ella drekka og vit fara væl um. Íbúðin hjá okkum er 112 kvm., liggur mitt í Árhus. Hon hevur køk, stovu, trý verilsir, baðiverilsi og gong. Hon liggur á 2. sali, hevur elevator og er tip top moderna. Gott samband til baðistrendur og skóg. Hevur hetta tygara áhuga, so ring
tlf. og fax 86 125554
ella mobil 21827606
+ 21818214

HÚS ELLA ÍBÚÐ
Ung hjún søkja hús ella íbúð í Vágum. Eru friðarlig og hvørki roykja ella drekka.
Tlf. 332023,
helst eftir kl. 18

HÚS ELLA ÍBÚÐ
ynskjast til leigu í Tórshavn ella á Streymoynni til einligan pápa við einari dóttir, sum ynskja at flyta heim úr Grønlandi.
Tlf. 317139

HÚS Í LEIRVÍK
til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 443388 ella 443211

HÚS TIL SØLU
Hús í friðaligum umhvørvi í Havn til sølu um nøktandi boð fæst.
Ringið 220425 eftir kl. 18

HÚS YNSKJAST
til leigu á eystara armi á Skálafjørðinum, ella møguliga í Gøtu skjótast gjørligt.
Vinarliga ringið tlf. 221367

HØLI TIL LEIGU
til skrivstovu ella forrætning.
Tlf. 315438

ÍBÚÐ ELLA KAMAR
søkist til eina unga hampuliga gentu. Eg eri 23 ár og søki eina íbúð ella kamar í Havn, skjótast gjørligt.
Tlf. 318619

ÍBÚÐ SØKIST
Tilkomin kvinna søkir íbúð, har man kann fara í bað einaferð um dagin, syngja, hoyra musikk og fáa sær eitt glas av víni, um man hevur ráð til tað og roykja. Annars fáa frið at vera menniskja.
Bill.mrk. 047790

ÍBÚÐ SØKIST Í HAVN
Friðarlig fólk sum fara væl um, søkja íbúð sum skjótast.
Vinarliga ringið tlf. 319865

ÍBÚÐ YNSKIST
Til vinkonu mína, sum júst er útbúgvin og skal flyta heim av flatlondum, søki eg um íbúð á Argjum, Tórshavn ella Hoyvík. Vinkona mín er ein sera fitt, friðalig, røkin og álítandi genta. Hon hvørki roykir ella drekkur. Kunnu tit hjálpa henni?
Vinarliga ringið 319597

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Einligur friðarligur sjómaður sóknast eina íbúð í miðbýnum ella nærhendis, fari væl um.
Tlf. 310424 ella 215566

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
skjótast gjørligt, skal helst hava 2 kømur.
Tlf. 313277
eftir kl. 17, Eyðna

KONTOR
við goymsluhøli ynskist til leigu í Tórshavnar umráðnum.
Tlf. 317865
ella 282165

SETHÚS
í Vestmanna við sera góðum útsýni, til sølu um hóskandi boð fæst. Byggiár 1979.
Tlf. 424407

Dýr

6 DVØRGAHAMSTARA-UNGAR
fáast við at avheinta teir. Bert til djóravin.
Tlf. 221038

DVØRGAHAMSTRARA
ungar til sølu fyri 40 kr. stk.
Tlf. 310226

HJÁLP!
Eg eri ein 14 vikur gamal kettlingur, sum verði noyddur at finna eitt nýtt heim. Eg er silvurgráur, fittur, vælvandur og reinligur. Ring til mínar eigarar og tosa við tey á
tlf. 372292

HUNDAFLUTNING-SKASSI
Ein góðkendur hundaflutningskassi til sølu. Áhugað kunnu ringja
tlf. 282116

HUNDAHVØLPAR
undan Border Collie tík, ið er av sera góðum seyðahundaslag, kunnu avheintast um tríggjar vikur.
Tlf. 447610

HUNDAHVØLPAR
Tveir hundahvølpar undan sera barnavinarligari tík, vera latnir djóravini.
Tlf. 310190
ella 221488

KANIN
Ein kanin, uml. 7 mðr. gomul, fæst við at avheinta hana.
Tlf. 448375

KANINIR
2 kaninir við búri til sølu, ein hvít og ein svørt, báðar eru uml. 8. mðr.
Tlf. 311239

KETTLINGAR
Ein sera fittur og reinligur kettlingur, verður latin djóravini.
Tlf. 314243

KETTLINGUR BURTURBLIVIN
um vikuskifti 26.-27. februar, er hvít við svørtum blettum, ca. 4 mðr. gomul. Hevur hvítt hálsband við tlf. innanfyri 310996. Vinarliga ring tlf. 316551, 310996
ella 312225

KETTLINGUR FUNNIN
Sprøklutur kettlingur við hálsbandi tikin upp í Steinatúni.
Tlf. 319513

TIL SØLU
Undulatar og zabrafinkur.
Tlf. 314434

TIL SØLU TIL DJÓRAVIN
2 undulátar, búr við ymiskum tilhoyri og bókin um undulátar fylgja við. Alt til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 317330,
Birita

ÚTSTAPPAÐUR
kópur, sera væl egnaður at prýða við, umleið 1,5 m. langur.
Tlf. 444352, Hermund

Fundir

AÐALFUNDURIN
hjá Føroya Ellisakførum verður leygardagin 11. mars kl. 16 í hølum felagsins Yviri við Strond 22.
Nevndin

ÁRSAÐALFUNDUR
Lýst verður til eykaaðalfund hjá Havnar Karate felag týsdagin 29. februar kl. 19.00 á Norðara Ringvegi 1.

FELAGIÐ FØROYSK TÓNASKALD
Aðalfundur felagsins verður í Pæsastovu tann 23.3. kl. 19.30.
a) Skrá sambært lógini
b) Uppskot um broytingar av viðtøkum um limaskap
c) Endurskoðan av viðtøkum felagsins.
FØT

FIBROMYALGI
fundur verður í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10, leygardagin 18. mars kl. 14.00. Á skránni er: Ymiskt.
Nevndin

LYMFØDEMFELAGIÐ
hevur ársaðalfund leygardagin 11. mars 2000, kl.15 í MBF-húsinum. Skrá sambært viðtøkum felagsins. Eliesar Olsen, yvirlækni, greiðir frá teim nýggjastu viðgerðarhættunum.
Nevndin

OGNARHAGIN Á MÝRUNUM
Toftir, hevur hagafund í fundarhølunum hjá Nes Kommunu leygardagin 18. mars kl. 14. Skrá: Val av orðstýrara, roknskapurin fyri 1999 til góðkenningar, ymist.

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
Fundur verður í Losjuni mikudagin 15.3. kl. 19.
Nevndin

Húsarhaldstól

BOSCH
vaskimaskina og ein frystiboks, 300 litrar, til sølu.
Tlf. 457770

EITT KØLISKÁP
til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 455443
ella 451283

FRYSTIBOKS
Brúkt frystiboks til sølu. Sær út sum nýggj.
Tlf. 373645
ella 220064

FRYSTIBOKS TIL SØLU
Ein Electrolux frystiboks 500 l., sær gott út, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 448375

LÍTIL
Morris uppvaskimaskina 45 x 45 x 48 cm, óbrúkt, til sølu fyri 1.500 kr. Vanligur prísur 2.890 kr.
Tlf. 311854

SENTRIFUGA
til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 313089

YMIST TIL SØLU
1 køl/frystiskáp 60/60/163 cm
1 8 pers. uppvaskimaskina
1 eimhetta
1 innbygningsovnur
1 keramikkókipláta
1 stálvask 40 x 56 cm.
Tlf. 283390
ella 312915

Innbúgv

BRÍK OG SOVISOFA
til sølu fyri 350 kr. stk.
Tlf. 328081

BRÚKT
spísistovuborð og seks stólar, bíliga til sølu.
Tlf. 315395

CHESTERFIELD MØBLAR
(leður), myrkabrún trýmanssofa, stólur og myrkt sofaborð. Lítið brúkt til sølu fyri kr. 9.000,-. Kann síggjast á www.møblar.abc.fo
Tlf. 214014

HVÍT
dupultsong, 180 x 200, til sølu.
Tlf. 457770

INNHURÐ
Hvít træ sprossahurð, bíliga til sølu. Nýprísur kr. 4.000, er sum nýggj.
Tlf. 318811 eftir kl. 17

LÍTIÐ BRÚKT
glas-sofaborð v/stálsokli/beinum, til sølu fyri kr. 1.500,-. Stødd: 80 x 140.
Tlf. 310245 eftir kl. 18

MARMORBORÐ
til sølu. 140 x 80, hevur stálbein, fimm stólar fylgja við. Prísur: 2.000,- kr.
Tlf. 315991

MØBLAR
1 sofa og 2 stólar til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 455443 ella 451283

NÝGGJ SONG
Nýggj boxmadrassong 180 x 200 cm. við gavl til sølu fyri bert 1200 kr.
Tlf. 315994, 441717
ella 210017

REOL
1 reol úr ljósum træ, fura, sær gott út.
Ring 312915 ella 283390

SOFUR
Tvær 3-manssofur, ein 2-manssofa og ein stólur, alt til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 448328

SOVISOFA TIL SØLU
2 pers., grøn, í góðum standi, fyri 2000 kr.
Tlf. 318474

STRÍPUT
hornasofa til sølu.
Tlf. 319210

TIL SØLU
leðurstólur við fótskamli til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 455443 ella 451283

Lutaseðlar

LIONS CLUB VÁGAR
Vinnarar á lutaseðli hjá LC-vágar, trektur á Giljanesi 5. mars 2000.

1. 1344	2. 4971
3. 4522	4. 1455
5. 7191	6. 5870
7. 6017	8. 2907
9. 7983	10. 2089
11. 1071	12. 3257
13. 299	14. 5575
15. 1459	

Tey, sum hava vunnið, sigi frá á tlf. 332966 ella 210444. LC-Vágar takkar fyri stuðulin

Pløgg

BUFFALO STYVLAR TIL SØLU!
Nýmótans svartir, stødd 36/37 við høgum hæli. Síggja gott út, nýprísur uml. 1.000 kr., men verða seldir fyri 500 kr.
Tlf. 317548

FØROYSK
klæðir til kvinnu stødd 36-38 ynskist.
Tlf. 215533

FØROYSK DAMUTROYGGJA
nýggj, ljósagrá, std. 40-42, bíliga til sølu.
Tlf. 313569 e. kl. 14

GRØNUR SKÓTABÚNI
Ynskist! Er tað nakar, ið hevur ein skótabúna (KFUK) 12-14 ár at selja okkum. Vinarliga ringi sum skjótast.
Tlf. 316008

GRØNUR SKÓTABÚNI YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur ein skótabúna 7-10 ár, grønir skótar hjá KFUM. Grækarismessa nærkast, so vinarliga ring sum skjótast.
Tlf. 211981

NÝTT OG VAKURT
brodera fyriklæði og turriklæð til før. búnan, til sølu, settið er blátt.
Tlf. 315811

SELHA SKÓGVAR TIL SØLU
Nýmótans svartir, stødd 37, við høgum botni. Lítið og einki brúktir, nýprísur 800 kr., verða seldir fyir 400 kr.
Tlf. 317548

SKJÚRT
til føroysk klæðir, stødd ca. 40. Tlf. 314915,
at hitta eftir kl. 18

TROYGGJA
til føroyska kvinnubúnan stødd 36-38, til sølu fyri 700 kr. Er lítið brúkt og sum nýggj. Nýprísur 1.225 kr.
Tlf. 220295

Sjavs

ALMENN SJAVSKAPPING
verður í Menningarfelagshølunum við Gøtugjógv sunnudagin 12. mars kl. 15. At vinna verða minnislutir og ferðasteyp. Tilmelding óneyðug.
Gøtu Menningarfelag

SJAVSKAPPING
verður fríggjadagin 10. kl. 18.30. Tilmelding ikki neyðug.
NSÍ

SJAVSKAPPING
Almenn sjavskapping verður á Cafe Blákross týsdagin 14. mars. kl. 19.00.

SJAVSKAPPING
verður á Svangaskarði mánakvøldið kl. 18.30.
B68

SJAVSKAPPING
verður í LÍF-húsinum týskvøldið 14/3 kl. 18.30. Tilmelding er ikki neyðug.
LÍF

SJAVSKAPPING
FM kapping í sjavs verður í Ítróttarhøllini í Runavík leygardagin 18.3. kl. 15.00 Tilmelding ikki neyðug. Føroya Shell stuðlar kappingina.
NSÍ og B68

Súkklur

AEROX YAMAHA
scootari til sølu fyri 17.000 kr.
Tlf. 317602 eftir kl. 17.30